# Hanus G. Johansen og Stanley Samuel

**Tað var rættur hátíðardámur í Vágsbotni ólavsøkudag, tá Listavirðisløn Miðlahúsins varð latin fyri fyrstu ferð. Hendingin fór fram á Nólsoyar Pálstorginum stutt eftir at tingið varð sett. Tað var Jan Müller, stjóri í Miðlahúsinum, sum beyð vælkomin og handaði tveimum tónlistamonnum virðislønina. Teir eru Hanus G. Johansen og Stanley Samuelsen. Vit prenta her røðuna, sum Jan Müller helt:**

Góðu ólavsøkugestir.

Hjartaliga vælkomnin til hesa hátíðarløtu á Nólsoyar Pálstorgi, her í Vágsbotni, har vit fara at handa Listavirðisløn Miðlahúsins.

Vit hava greitt frá hesari virðisløn í fjølmiðlunum, so eingin orsøk er her at fara í smálutir. Skal bert vísa á, at tað er av størsta týdningi, at vit øll - tað almenna eins væl og tað privata - sýna okkara listafólkum viðurkenning og takksemi.

Uttan alt, sum okkara listafólka skapa, vóru vit fátæk og mentanarliga illa fyri. Vit høvdu verið sum skip uttan barlast, uttan kumpass og kós. Okkara lív hevði verið tómt og uttan tær ríkandi upplivingar, sum listafólk geva okkum. Okkara samleiki sum tjóð hevði ikki verið tann sami.

Tað er okkara mentan, sum ger okkum til eina tjóð, sum kann savnast á einum degi sum hesum.

Ólavsøkan er okkara tjóðar-

*Stanley Samuelsen fekk handað heiðursbræv og 50.000 kr.*







miðlahúsið í Vágsbotni

LISTAVIRÐISLØN MIÐLAHÚSINS

*Stanley Samuelsen*

*Listavirðisløn Miðlahúsins verður tann 29. juli 2008 latin Stanley Samuelsen, tónaskaldi og sangara, sum tøkk og viðurkenning fyri hansara vøkru løg og hansara hugtakandi og sermerkta framburð av egnum løgum. Løg og framførslur Stanleys eru fólkatónleikur á sera høgum altjóða støði. Løg hansara hava ríkað okkum og tey nema við hjartarøturnar á føroyingum, og tí er hann sera væl umtóktur av ungum sum eldri. Fleiri av løgum hansara eru vorðin fólkaogn, ið verða sungin, har fólk koma saman til almennar so væl sum til privatar samkomur eins og fløgur hansara eru at kalla í hvørjum húsi. Við sínum eyðkendu og væl dámdu løgum hevur Stanley Samuelsen tikið fram í ljósið eldri føroyskan skaldskap eftir eitt nú J.H.O. Djurhuus, Jóannes Patursson og H.A. Djurhuus, sum á hendan hátt aftur eru vorðnir kunnugur nýggjum ættarliðum. Stanley Samuelsen hevur við hepnari hond eisini sett løg til yrkingar hjá yngri yrkjarum og soleiðis breitt út kunnleikan til hesar. Umframt at vera gávuríkt tónaskald og sangari telist Stanley Samuelsen millum teir allrabestu gittarleikarar, sum tað er ein sonn frægd at lýða á. Yndisligu løg Stanleys hava stóran mentanarligan týdning og soleiðis eisini stóran týdning fyri føroyskan samleika.*

TÓRSHAVN 29. JULI 2008

JAN MÜLLER
ÁBYRGDARSTJÓRI